Løgtingsvalið 2002:

# Regn og sól á Hálsi

**Røðin av fólki klokkan 10 í gjáramorgunin stóð heilt út í tún. Heilt fitt av fólki var komið at velja, longu áðrenn størsta valhølið, ítróttarhøllin á Nabb, lat upp. Áðrenn klokkan 11 fyrrapartin í gjár, høvdu longu 1032 fólk verið og sett sín kross**

LØGTINGSVAL
*Orð: Heri á Rógvi*
*& Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Sólin hevði hug at kaga fram, meðan nakrir regndropar eisini duttu niður uttanfyri ítróttarhøllina á Hálsi fyrrapartin í gjár. Lagnuvalið, sum tað so ofta hevur verið nevnt, fór klokkan 10 veruliga av bakkastokki.

Men tað vóru ikki bara regndropar, ið vóru á Hálsi. Nei, tað regnaði við veljararum, og stórur áhugi vísti seg at vera millum fólk. Fólk í øllum aldri høvdu leitað sær niðan á Háls, og var hýrurin góður.

Tá Sosialurin leitað sær oman í miðbýin var eisini fitt av fólki, ið gekk og hugdi eftir valplakatum. Við Kunningarstovuna stóð ein heilur flokkur av barnagarðsbørnum og hugdi eftir teimum litføgru valplakatunum. Sjálvt um tey ikki hava valrætt enn, so eru tey jú framtíðarveljarar.



*Eisini tað yngra ættarliðið slapp við á val*



*Røðin av fólki minkaði so at siga ikki uppi á Hálsi*



*Nógv fólk var í miðbýnum sjálvan valdagin*

### Stórur áhugi

Jens Marius Poulsen, sum er formaður fyri valstýrið í Tórshavn, sigur, at áhugin fyri valinum er øgiligur. Talið av brævatkvøðum er 950, og hetta er væl meira enn vanligt.

Onkrar broytingar eru eisini gjørdar í vallógini, soleiðis at valið ikki gongur heilt eins fyri seg hesaferð. Eitt nú skulu fólk ikki nýta blýant, men talan skal bert vera um eitt skriviamboð.

Eisini sjónveik kunnu velja, hvønn tey vilja hava at hjálpa sær við at atkvøða.

Eisini útlendsk fjølmiðlafólk leitaðu í stórum tali niðan á Háls. Tað eru fjølmiðlar komnir úr Danmark, Grønlandi og aðrastaðni.






## Veljararnir siga

Vit hava spurt nakrar av veljarunum, ið høvdu leitað sær niðan á Háls, fyrrapartin í gjár, hvønn teir høvdu sett kross við. Dentur skal leggjast á, at valið av fólkum er heilt tilvildarligt



**Chris Poulsen**
– Eg havi valt Lisbeth L. Petersen, tí eg haldi, at hon førir tann rætta politikkin. Eg havi alt mítt lív valt Sambandsflokkin.



**Helma Mikkelsen**
– Eg havi sett krossin við Sambandsflokkin. Tað havi eg altíð gjørt, og øll familjan hjá mær velur Sambandsflokkin, á báðum síðum, tað vil siga, eisini familjan hjá manninum. Nú eri eg 88 ára gomul, og tað loysir seg ikki at broyta meining nú. Valstríðið ávirkar meg als ikki, tí eg veit, hvat eg velji.



**Pætur Hansen**
– Poul Mikkelsen fekk mína atkvøðu. Hann er borgarligur, og ímóti ES. Sjálvur eri eg ímóti ES. Tað er alt ov bundið, og um sambandið sleppur til, fara vit heilt vist í ES, og tað dámar mær onki.



Jóannes Eidesgaard hevur seinastu valini verið tann sterki maðurin í Suðuroynni. Hann var eisini og valdi týsmorgunin.

Javnaðarflokkurin plagar at hava gott tak á Suðuroynni.

## Heðin Mortensen



Ein av teimum absolut meira markantu valevnunum hesaferð – í øllum førum í høvuðsstaðnum – er Heðin Mortensen.

Hann var sjálvur saman við konuni og valdi á størsta valstaðnum, Ítróttarhøllini á Hálsi, týsmorgunin um ellivu tíðina. Tað vóru heldur ikki fá fólk, ið savnaðust um Heðin, tá hann var millum veljararnar á Hálsi.

Tá vit hittu Heðin, eftir at hann hevði verið og valt, so segði hann seg hava hampuliga góðar vónir til, at hann fór at gera eitt gott val. Seinanst slap hann inn á ting sum eykamaður.

Um valstríðið sigur Heðin Mortensen:

– Tú ert noyddur at vera nógv frammi. Fleiri og fleiri miðlar gera seg galdandi, og tú verður noyddur at halda teg framat, sigur Heðin Mortensen.

Heðin Mortensen hevur roynt seg við lýsingum í bæði bløðum, á bussum og øðrum miðlum.

Heðin sigur seg vera hepnan, tí hann hevur eitt stórt lið aftanfyri seg við hjálparfólki,og tað hevur lætt nógv um hjá honum. Kostnaðurin fyri valstríðið hevur verið um 50.000 kr., sigur Heðin, men tað hevði ikki borið til, um hann var einsamallur, og skuldu øll fólkini fingið løn, so hevði kostnaðurin verið nógv hægri.

Heðin sigur seg samstundis leggja stóran dent á at ferðast millum fólk, og hann hevur eisini ringt til fólk og heitt á tey um at velja seg og flokkin.

## Kristian Magnussen



Tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymy, Kristian Magnussen, var eisini og valdi um ellivu tíðina týsmorgunin. Hann gjørdi eitt sera gott val fyri fýra árum síðani, tá hann fekk 705 persónligar atkvøðum. Hann roknar tó ikki við eins stórum atkvøðutali hesaferð í mun til seinast.

Honum dámar als ikki mátan, ið valstríðið hevur koyrt uppá.

– Hetta hevur verið elendigt. Tað hevur verið alt ov nógv og alt ov óskipað, sigur Kristian.

Hann sigur, at tað einki hevur við taktikk at gera, at hann ikki hevur verið so nógv frammi við lýsingum.

– Tað er meira prinsippið, at vanlig fólk ikki skulu til at nýta so ótrúliga nógvar pengar uppá eitt valstríð, sigur Kristian.

– Eg haldi, at hetta við øllum hesum lýsingunum er nakað tvætl, meinar ein avgjørdur Kristian.

Hann sigur seg altíð verið nógv í kontakt við fólk, og hetta ger hann enn. Hann ringir ikki runt, men tað eru onnur, sum reka fyri hann, ljóðar tað frá honum. Hesi gera tó ikki eftir boðum.

## Høgni Hoydal



Mest umsvermaði maðurin í Ítróttarhøllini á Hálsi var Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins. Tíð var ikki til at práta við mannin, ið útlendsk eins og føroysk pressa stóð og bíðaði eftir.

Hann hevur tó áður úttalað, at valstríðið hevur verið siðiligt og hevur snúð seg um loysing og samband.

